LØGTINGIÐ

# Røða til friðargonguna

**Løgtingsformaðurin**

23. juli 2026

Góðu føroyingar, góðu tit øll, sum eru savnað her í kvøld.
Takk fyri, at tit eru komin saman til hesa friðargongu og takk fyri møguleikan at siga nøkur orð.

Vit standa her í Tórshavn – kanska friðarligasta høvuðsstaði í heiminum. Vit liva í einum samfelag, har børn ganga trygt í skúla. Har vit hava frælsi at siga okkara hugsanir. Har vit vakna til ein nýggjan dag, uttan ótta fyri sirenum, bumbum ella ófriði.
Tað kennist kanska sum ein sjálvfylgja, men tað er ongin sjálvfylgja.

Á landakortinum er langt frá Føroyum til heimsins mongu brennideplar. Men hjá teimum, sum liva har, er ongin frástøða. Har missa pápar og mammur børn síni. Børn missa foreldur. Vinir missa hvønn annan.
Tað eru milliónir av menniskjum, sum hvønn morgun vakna við einum einasta ynski: *At koma livandi ígjøgnum dagin.*
Meðan okkara stúranir ofta snúgva seg um prísir, arbeiði, bústað og gerandisdagin, snýr teirra gerandisdagur seg um at yvirliva.

Nýggjastu tølini vísa, at fleiri vápnastríð eru í heiminum í dag enn nakrantíð síðan seinna heimsbardaga.
Tað eigur at fáa okkum øll at steðga á.
Tað er eisini tí, at vit eru komin saman her í kvøld.

Ikki tí at ein friðargonga í Tórshavn steðgar nøkrum kríggi.
Men, tí at líkasæla ongantíð hevur havt frið við sær.

Tað er tí eisini lætt at spyrja:
Ger tað yvirhøvur nakran mun, at vit savnast her ?
Ja.

Tí at allar broytingar og rørslur byrja við teimum menniskjum, sum velja ikki at tiga. Tað er tað, sum kann broyta nakað.

Seinastu árini hava vit sæð kríggið í Ukraina leggja ein álvarsaman skugga yvir Evropa. Samstundis vita vit eisini, at heimurin er størri enn okkara nærumhvørvi.
Í Miðeystri liva familjur framvegis við bumbum, gíslatøkum og í ótta. Í Sudan, Kongo og fleiri øðrum londum verða milliónir av menniskjum rakt av kríggi og hungursneyð.

Støðurnar eru ymiskar, men sorgin er tann sama.
Tárini hjá eini mammu kenna ikki tjóðskap, og menniskjavirði kennir ongi landamørk.
Tí eiga vit heldur ikki at gera mun á, hvør hevur tørv á okkara samkenslu.

Sum føroyingar eru vit partur av einum norðurlendskum felagsskapi, bygdur á fólkaræði, álit og virðing fyri menniskjarættindum.
Hetta eru virðir, sum ikki kunnu takast fyri givið.
Minni enn helvtin av heimsins borgarum liva í londum, sum verða roknað sum fólkaræði.
Tað minnir okkum á, hvussu stór ábyrgd hvílir á okkum, sum hava frælsi. Ikki bara at njóta tað og taka tað fyri givið, men eisini at verja tað. Við orðum, við handlingum, og við at vísa samhaldsfesti við teimum, sum ikki hava somu møguleikar.

Hóast vit liggja mitt úti í Norðuratlantshavinum, eru vit væl bundin til restina av heiminum. Tí er ongin oyggj so lítil, at hon ikki hevur eina ábyrgd. Og ongin rødd er so veik, at hon ongan mun ger.

At ganga friðargongu í Tórshavn í kvøld, er eitt greitt “nei” til líkasælu. Við hesum siga vit greitt, at menniskjalív hevur virði. Vit siga, at vit ikki góðtaka, at kríggj er ein natúrligur partur av heiminum. Vit siga, at vit framvegis trúgva upp á frið.

Einsamøll fáa vit ikki frið í heimin. Men hjá hvørjum einstøkum av okkum ber til at skapa frið rundan um okkum.

Tí friður byrjar við orðunum, sum vit velja. Við virðingini, sum vit vísa hvørjum øðrum. Vit hondini, sum vit rætta fram. Og við einum dirvi, at síggja sjálvt menniskjað, áðrenn vit síggja tað, sum skilur okkum.

Kanska hevði samfelagið verið eitt sindur friðarligari, um vit brúktu minni orku upp á tað, sum provokerar okkum, og meiri orku upp á tað, sum bindur okkum saman.

Latið okkum tí halda fast í hjartarúminum. Latið okkum ongantíð gevast við at trúgva, at friður og rættvísi eru verd at stríðast fyri.

Tí friður byrjar, tá líkasælan endar.

Takk fyri, at tit ganga fyri friði í kvøld.
Takk fyri tykkara stóra hjartarúm.

Johan Dahl,
løgtingsformaður